# Løgmanssteypið byrjar

Fyrstu dystirnir í kappingini um løgmanssteypið verða spældir leygardagin. Talan er um undanumfarið, sum er ásett, fyri at talið av eftirverandi liðum skal samsvara við tey 16, sum náttúrliga kunnu taka lut í 1/8-finalunum. Dystirnir leygardagin eru NÍF-MB og Fram-Undri. 20. mars verður so fyrsta veruliga umfarið í kappingini á skránni.



# Schmeichel til Coventry

Kasper Schmeichel, sum hevur sáttmála við Manchester City, hevur nú gjørt sáttmála við Coventry í næst bestu ensku deildini. Schmeichel hevur áður verið leigaður til Darlington, Bury, Falkirk og Cardiff, og í Manchester City eru tey fegin um, at ungi málverjin nú kann vinna sær enn fleiri royndir. Og eisini Coventry er venjarin fegin. – Kasper hevur prógvað, at hann hevur allar kravdar eginleikar til at verða ein Premier Leagu-málverji í toppflokki. Og eg eri ikki í iva um, at hann verður ein góður styrkur í hópinum, sigur Chris Coleman, sum er manageri hjá Coventry. Roknað verður við, at Schmeichel verður í málinum, tá Coventry í morgin spælir móti Sheffield Wednesday.

# Ford Cup finala leygardagin

**Leygardagin klokkan 19 verður finalan í Ford Cup hildin í Tølthøllini hjá Føroyskum Íslandsrossafelagi í Havnardali**

RÍÐING
*Annika H. Isfeldt*
*post@sosialurin.fo*

Talan er um gongulagskapping, har nøkur av Føroya allarbestu rossum kappast í fjórgongd og tølt. Tvey innleiðandi umfør hava verið, har luttakararnir hava samlað sær stig. Luttøkan til undanfarnu kappingarnar hevur verið stór og stuttligt hevur verið at sæð tey flottu rossini folda seg út. Øll eru vælkomin niðan í Tølthøllina at síggja sera spennandi finaluna um, hvørjir Ford Cup meistararnir verða.



*Bestu rossini í landinum taka lut í gongulagskapping í Havnardali leygardagin*

**Í finaluni luttaka:**

B-finala fjórgongd:
Poli Joensen og Vørður við 7 stigum
Jákup Berg og Matti við 7 stigum
Gunrid á Plógv og Ramses við 6 stigum
Hildur á Plógv og Geronimo við 3 stigum

B-finala tølt:
Kristfríð Jacobsen og Rán við 8 stigum
Hildur á Plógv og Geronimo við 6 stigum
Gudmund Hansen og Glói við 4 stigum
Andrias Jacobsen og Prins við 1 stigi
Óli Jóhan Láberg og Snjófaxi við 1 stigi

A-finala fjórgongd:
Heri Dahl og Leiknir við 20 stigum
Kristfríð og Tór við 16 stigum
Óli Jóhan Láberg og Snjófaxi við 11 stigum
Kristfríð Jacobsen og Rán við 11 stigum

A-finala tølt:
Poli Joensen og Vørður við 20 stigum
Poli Joensen og Kolli Káti við 16 stigum
Kristfríð Jacobsen og Tór við 13 stigum
Heri Dahl og Leiknir við 12 stigum
Knút Lützen og Drottning við 12 stigum

Hetta verður eisini raðfylgjan til kappingina.

Atfaná kapingina verður hugnaløta í frálíka hølinum í Tølthøllini. Her verður hugnaligur tónleikur og góður matur at fáa.

# Undirskrivaðu stuðulsavtalu

**Mikudagin undirskrivaðu Suðuroyar Sparikassi og ungdómsdeildin hjá samanløgdu liðunum hjá VB/Sumba og TB stuðulsavtalu**

STUÐUL
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Suðuroyar Sparikassi er nú høvuðsstuðul hjá dreingjum og smádreingjum hjá VB/Sumba og TB, ið hava lagt saman, tá tað snýr seg um ungdómsdeildina.

Samstarvið hevur virkað sera væl hesi 3 árini, ið ungdómsliðini hava leikt saman, og teir vunnu greipuna í fjør og gjørdust nummar 2 í steypakappingini.

Suðuoyar Sparikassi hevur stuðlað samstarvinum øll árini, men nú er so á fyrsta sinni avtala undirskrivað, og Suðuroyar Sparikassi er nú formliga høvuðsstuðul hjá dreingjunum og smádreigjunum hjá VB/Sumba og TB. Avtalan er galdandi í eitt ár.

Áður hava teir skift millum at havt ymsu liðbúnarnar, men nú fáa teir nýggjar og egnar búnar, har troyggjan er heldur ljóst grøn, meðan buksur og hosur eru myrkar.

Liðini venja eina viku í hvørjum av heimstøðunum, og dystir verða spældir aðruhvørja ferð í Vági og á Tvøroyri. Bæði smádreingirnir og dreingirnir skulu fyrstu ferð í eldin, tá kappingin byrjar 24. mars.

Venjari hjá Dreingjunum er Finn Johannessen og hjá smádreingjunum Dan Jensen.



*Elsebeth Samuelsen, Heidi Djurhuus vegna VB/Sumba, TB, og Teresa Jensen frá Suðuroyar Sparikassa skriva undir stuðulsavtalu*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

**Hondbóltur**

SUNSET KAPPINGIN – KVINNUR

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 19 | 17 | - | 1 | - | 1 | 563 | 426 | 137 | 35 |
| 2 VB | 19 | 11 | - | 2 | - | 6 | 459 | 417 | 42 | 24 |
| 3 Neistin | 19 | 12 | - | 0 | - | 7 | 472 | 451 | 21 | 24 |
| 4 Kyndil | 19 | 7 | - | 1 | - | 11 | 442 | 493 | -51 | 15 |
| 5 StÍF | 19 | 5 | - | 1 | - | 13 | 428 | 469 | -41 | 11 |
| 6 VÍF | 19 | 2 | - | 1 | - | 16 | 414 | 522 | -108 | 5 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN – MENN

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 19 | 14 | - | 1 | - | 4 | 555 | 440 | 115 | 29 |
| 2 Neistin | 19 | 12 | - | 2 | - | 5 | 537 | 493 | 44 | 26 |
| 3 Kyndil | 19 | 10 | - | 2 | - | 7 | 509 | 507 | 2 | 22 |
| 4 H71 | 19 | 7 | - | 2 | - | 10 | 472 | 483 | -11 | 16 |
| 5 VÍF | 18 | 6 | - | 2 | - | 10 | 500 | 540 | -40 | 14 |
| 6 KÍF | 19 | 3 | - | 1 | - | 15 | 453 | 563 | -110 | 7 |

**Flogbóltur**

**Meistaradeild kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 17 | 16 | - | 1 | 50 | 10 | 40 | 21 |
| 2 ÍF | 17 | 15 | - | 2 | 47 | 17 | 30 | 20 |
| 3 Dráttur | 18 | 12 | - | 6 | 42 | 27 | 15 | 16 |
| 4 Mjølnir | 17 | 7 | - | 10 | 28 | 36 | -8 | 9 |
| 5 KÍF | 18 | 6 | - | 12 | 27 | 38 | -11 | 7 |
| 6 TB | 17 | 5 | - | 12 | 22 | 39 | -17 | 7 |
| 7 Fleyr | 18 | 0 | - | 18 | 5 | 54 | -49 | 0 |

**Meistaradeild menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 12 | 9 | - | 3 | 33 | 20 | 13 | 13 |
| 2 ÍF | 12 | 8 | - | 4 | 30 | 21 | 9 | 12 |
| 3 Mjølnir | 12 | 6 | - | 6 | 25 | 23 | 2 | 9 |
| 4 Fleyr | 12 | 1 | - | 11 | 11 | 35 | -24 | 2 |

# Linligt seinasta umfar

**Hjá monnunum er allur spenningur, nú seinasta umfarið undan finalunum stendur á skránni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við javnleikinum millum Neistan og Kyndil seinasta sunnudag hvarv seinasta restin av spenningi undan sjálvum FM-finalunum.

Har verða tað nevnliga StÍF og Neistin, sum skulu dystast, og hesi bæði liðini hittast eisini á Skála um vikuskiftið. Sum skilst, so er tó væntandi, at bæði liðini í stóran mun fara at spara seg í dystinum. Bæði tí onkrir av spælarunum hava tørv á hvíld undan nøkrum finaludystum, men helst eisini tí venjararnir ikki ynskja at avdúka nakrar taktiskar ætlanir, fyrr enn úrslitið veruliga telur.

Tveir aðrir dystir verða eisini spældir um vikuskiftið. Í Høllini á Hálsi í Havn tekur Kyndil ímóti KÍF, og í Vestmanna tekur VÍF ímóti H71.

Bert tann seinasti av hesum dystunum kann broyta nakað á stigatalvuni. Vinnur H71 dystin, so eru teir nevnliga ájavnir VÍF í stigum. Og tó at H71 hevur ein munandi verri málmun, so stendur í løtuni á jøvnum í innanhýsis uppgerðunum, sum nú eru avgerandi, um stigatalið er tað sama.